## Kinesisk matmentan verjir

Jóhan Poulsen er knýttur at universitetssjúkrahúsinum, Kings College í London, og í løtuni er hann saman við øðrum í holt við eina spennandi altjóða verkætlan, har sambandið millum mat og prostatakrabba verður kannað. - Vit kanna millum annað prostata hjá kinesarum í Bejing og inuittum í Grønlandi og samanbera úrslitini við tølini hjá donskum monnum. Og ein pilotkanning, sum vit hava gjørt, vísir, at samband er millum ósunnar feittsýrur og prostatakrabba. Altjóða hagtøl fyri prostatakrabbamein staðfesta, at menn í Asia og rundan um Miðalhavið ikki fáa so ofta prostatakrabbamein, sum menn í Norðureuropa og USA, og hildið verður at hetta hevur samband við kostin. - Aðrar kanningar stuðla hesum. Millum annað vísir tað seg, at tá kinesarar flyta til USA, so ganga bara tvey ættarlið, so hava teir somu prostatatøl sum aðrir amerikanarar. Tað er altso ikki biologiski arvurin, men sosiali lívstílurin sum er avgerðandi.

# Føroyskir menn vita ov lítið um

**Skjót viðgerð av krabbameini í prostata – bløðruhálskertlinum – er lekjandi, men í Føroyum fær sjúkan alt ov ofta frið at breiða seg, staðfestir Jóhan Poulsen, yvirlækni á Aalborg Sjúkrahúsi og serlækni í urologi**

HEILSA

*Dorit Hansen*

Alt ov nógvir føroyskir menn ganga við prostata krabbameini uttan at fáa tað staðfest, fyrr enn krabbameinið hevur breitt seg til beinagrindina. Og tá er mangan ov seint at fáa lekjandi viðgerð.

Hetta er niðurstøðan hjá Jóhan Poulsen, yvirlækna við kirurgiskari prostataviðgerð sum undirserøki. Tey seinastu fimtan árini hevur hann regluliga verið í Føroyum og kanna og viðgjørt menn við prostata krabba, og nógvir føroyskir menn hava verið til viðgerð hjá honum á Aalborg Sjúkrahúsi.

-Prostatakrabbamein hevur verið eitt vanrøkt øki í Føroyum. Eg vil næstan siga, at man hevur havt ein nihilistiska støðu til sjúkuna. Lítið hevur verið gjørt fyri at staðfesta hana, og meðan onnur lond hava sett í verk skjótar og virknar viðgerðir, so hevur føroyska skipanin ikki fylt við, sigur føroyski yvirlæknin.

Í Svøríki byrjaði man fyri langari tíð síðani at seta inn móti prostatakrabbameini við fleiri blóðroyndum og skjótari viðgerð, og kanningar hava staðfest at hetta gjørdi stóran mun. Danmark fylgdi eftir fyri nøkrum árum síðani, men sambært Jóhan Poulsen, er føroyski hugburðurin til sjúkuna framvegis ov konservativur og passivur.

- Gamli hugburðurin var, at man mátti liva við prostatakrabba – og tí eisini doyggja við sjúkuni. Men tað er ein pínufullur deyði, tí sjúkan fer í beinagrindina, og sjúklingurin fær eina ringa sjúkralegu, greiðir Jóhan Poulsen frá.

Og í dag er niðurstøðan, at prostatakrabbi ikki er nakað man kann – ella skal – liva við. Tað er ein deyðilig sjúka, um hon ikki verður viðgjørd í góðari tíð.

Tí er politikkurin aðrastaðni at staðfesta sjúkuna so skjótt sum møguligt og bjóða best egnaðu viðgerð. Úrslitið er, at fleiri menn verða frískir og fleiri fáa eina betri sjúkratíð. Men Føroyar hava ikki heilt fylgt við á hesum økinum, staðfestir yvirlæknin.




### Prostata Awareness

- Tað hevur alstóran týdning, at fólk verða kunnaði um prostata, soleiðis at menn eru varnir við sjúkueyðkenni, sigur Jóhan Poulsen.

Aðrastaðni hava tey Prostata Awareness dagar á sama hátt sum man hevur átøk um aids, krabbamein og roykiátøk, har fjølmiðlar eru við til at upplýsa fólk um sjúkuna, sjúkueyðkenni og viðgerðarmøguleikar. Men hetta er ikki komið til Føroya enn. Her verður ov lítið tosað um prostatakrabbamein í almenna rúminum.

Jóhan Poulsen vísir eisini á leiklutin hjá kommunulæknum. Menningin innan urologi - og ikki minst krabbameinsviðgerðir innan urologiska øki - hevur gingið við rúkandi ferð seinastu árini, og um kommunulæknar ikki fylgja við, so eru teir ikki førir fyri at geva sjúklingum neyðuga kunning og kanning.

### Robot í undirlívi

Urologi er í dag eitt sera tøknitungt øki, og viðgerðir eru so nágreiniligar og varligar, at sjúklingurin í nógv størri mun varðveitir nervaløg, potens og lukkivøddar.

Tað nýggjasta innan prostataviðgerð eru robotstýrdar kikaraskurðviðgerðir, har læknin stýrir tólunum inni í kroppinum á sjúklinginum við fjarstýristavum.

- Hetta er spildurnýtt, og vit hava higartil gjørt 100 skurðviðgerðir við hesum nýggja tólinum, greiðir Jóhan Poulsen frá. Robotturin kostaði 12 milliónir, og vanligt viðlíkahald kostar 1,2 milliónir um árið, umframt at amboðini til hvørja skurðviðgerð kosta á leið 10.000 krónur.

- Tað vil siga, at um ein sjúklingur verður skurðviðgjørdur hvønn einasta dag tey næstu tíggju árini, so kostar hvør skurðviðgerð 40.000 krónur, sigur føroyski yvirlæknin og staðfestir, at Føroyar ikki hava sjúklingar nokk til ein slíka íløgu.



*Aðrastaðni verður alt gjørt fyri at staðfesta prostata krabbmein so skjótt sum møguligt og bjóða best egnaðu viðgerð. Úrslitið er, at fleiri menn verða frískir og fleiri fáa eina betri sjúkratíð. Men Føroyar eru eftirbátur á økinum, staðfestir Jóhan Poulsen, yvirlækni*

*Mynd: Dorit Hansen*

### Tørv á fleiri tólum

Jóhan Poulsen arbeiðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, tá ið hann er í Føroyum. Og meginparturin av monnunum, sum hann kannar, fáa eisini viðgerð har. Tað eru einans á leið fimm prosent av sjúklingunum, sum hava tørv á skurðviðgerðum, sum ikki kunnu gerast í Føroyum.

- Tað er ein stórur fyrimunur og sparing, at menn kunnu fáa forkanning, eftirkanning og vanliga viðgerð her. Og at teir so kunnu koma til mína deild í Danmark gevur ein eyka kontinuitet í viðgerðini, sigur føroyski yvirlæknin.

Hóast tað ikki er skilagott ella ynskiligt, at Føroyar gera risaíløgur í stórar robottar, so staðfestir Jóhan Poulsen at tað hevur gingið ov trekt at fáa tól, sum tildømis kunnu staðfesta sjúkuna.

- Ikki fyrr enn í fjør fekk Landssjúkrahúsið tól at kanna um menn hava prostata, og skannarin í Klaksvík, sum er eitt sindur eldri, var ein gáva frá pengastovni, greiðir hann frá og vísir á, at um grundleggjandiviðgerð skal fara fram í Før-